

## Ætla golfdepil á Sandi

Gongst sum borgarstjórin á Sandi, Páll á Reynatúgvu (myndin) ætlar, verður Sands bygd ein miðdepil fyri golfspælarar í framtíðini. Á bygdaráðsfundi á Sandi í gjárkvøldið varð eitt uppskot lagt fram um eina verkætlan, sum Páll, saman við konu sínari og Anfinn Rubek Nielsen ætla at seta í verk. Verkætlanin ber heitið “Sandoy Golf and Leirsure Village”, skrivar heimasíðan bkv.fo. Ætlanini er í fyrsta lagi at gera ein 9 hols golfvøll norðast á Traðardalinum, á einum lendi sum í fyrsta lagi verður leigað. Samlað lendið undir golfvøllinum er 318.000 fermetrar. Ein frítíðarbygd við ikki minni enn 150 húsum skal eisini gerast, eins og tænastubygningar uppá tilsaman 200 fermetrar hvør. Á bygdaráðsfundinum fekk málið einmælda undirtøku.

# Lívskvalitetur til limirna




**- Sjálvandi ynski eg góða løn til limirnar. Men tað er líka týdningarmikið, at teir hava eitt gott lív. Hetta sigur danski fakfelagsbossurin, Poul Erik Skov Christensen, formaður í størsta danska verkamannafelagnum, 3F, sum vitjar Samtak í hesum døgum**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Her er ongin ivi. Hann er tungur, grovmæltur, skallutur við gráum skeggi og brillum, og hevur eitt fast lógvatak og smílandi eygu: Ein ordiligur fakfelagsbossur is in town!

Poul Erik Skov Christensen er formaður í størsta danska fakfelagnum, 3F, sum umboðar nøkulunda somu starvsbólkar sum verkamannafeløgini í Samtak. Tað vil siga faklærdar og ófaklærdar arbeiðarar innan allar vinnugreinir.

Í felagnum 3F eru heili 325.000 limir, bæði konufólk og mannfólk, og tað eru nú fýra á síðani, at tey bæði verkamannafeløgini KAD (kvinnurnar) og SID løgdu saman, og soleiðis gjørdust størsta felagið í Danmark: 3F.

Samtak bjóðaði umboðum fyri donsku verkamannafeløgini upp til Føroyar at greiða frá um samanleggingar til størri eindir. Eisini varð prátað um, hvussu danir fáa nýggjar limir, og hvussu teir royna at varðveita limaskarðan.

Umleið 60 fólk møttu upp á ráðstevnuni hjá Samtak, sum var í gjár, mánadag, og hetta vóru nógv fleiri, enn tey høvdu vónað og væntað hjá Samtak.

Úr 3F vóru tvey umboð, sum greiddu frá: Pau Jensen, lokalformaður, og Poul Erik Skov Christensen, landsformaður.

Nú, fáar tímar áðrenn donsku gestirnir fara av landinum aftur, hitta vit formannin, Poul Erik Skov Christensen til eitt prát um avbjóðingarnar hjá nútímans verkamannafeløgum.